# Aftur í Føroyum 60 ár seinni

**Sum 14 ára gomul kom Herborg Kragset til Føroya saman við foreldrunum og tveimum yngri systkjum. Eftir at hava búð í Klaksvík í meiri enn 5 ár, fóru tey aftur til Noregs, haðani tey vóru flýdd í 1940, tá týskarar bumbaðu nær heimi teirra í Ålesund**

FÓLK Á LEIÐINI
*Rúna Sivertsen*

Tá tey við norska fiskiskipinum, Juvel, komu inn eftir vánni í Klaksvík, sóu tey, at bryggjan var full av fólki, sum var komið at taka ímóti teimum.

Tveir dagar frammanundan høvdu tey veitrað heimlandinum farvæl, og nú komu tey spakuliga siglandi inn móti bryggjuni í hesum fremmanda landi.

Hvat bíðaði teimum, og hvussu tey fóru at verða móttikin, vistu tey ikki. Tey vóru flýdd úr Noregi, tá ein bumba brast nær heimi teirra í Ålesund.

Ætlanin var, at tey skuldu fara við skipinum til ommuna og abban, sum búðu nærhendis. Men við tað, at Juvel var lastaður við lóðuri, varð avgjørt heldur at sigla til Føroya við skotverkinum.

Soleiðis bar tað á, at Herborg, saman við mammuni og systkjunum, kom at búgva í meiri enn 5 ár í Klaksvík. Pápin, sum var við, tá tey komu, fór seinni til Bretlands, har hann var við í norska herinum.



*Herborg Kragset og maður hennara, Jon Misfjord búgva í Ålesund, har tey í 36 ár høvdu el-handil. Herborg og Jon eiga dótrina, Randi*

### Komið til okkara

- Móttøkan vit fingu frá klaksvíkingum, var einastandandi. Komið til okkara, komið til okkara, søgdu tey, sigur Herborg ógvuliga rørd.

Hon sigur, at í Føroyum lærdi hon gestablídni.

Tað var sjálvsagt ikki lætt at koma til eitt fremmant land, og tað gekk ein tíð, áðrenn tey øll vóru komin rættiliga uppá pláss. Fyrst sluppu tey at vera inni hjá fólki, men seinni fekk mamma hennara eina íbúð í kjallaranum hjá Emmu Fugloy.



*Helge, mamman Oline, Herborg og Annfrid. Myndin varð tikin til at senda pápa hennara, Jonas Kragset, sum var í Bretlandi í norska herinum*

Mamma hennara fór at arbeiða í fiski, tí hon vildi sleppa undan at fara til konsulin eftir peningi.

Eftir at Herborg eina tíð hevði havt húspláss, fekk hon starv á tøystovuni hjá Michael Jaobsen. Handilin "hjá Kal" er enn tann dag í dag á sama staði, sum hann var tá.

- At koma til Kal at arbeiða, var sum at koma í himmalin; har hevði eg tað ógvuliga gott, sigur Herborg.

Við gleði minnist hon aftur á øll tey, sum tóku hana at sínum hjarta, tá hon blaðung varð noydd at flyta so langt frá heimlandi sínum.

### Helt øll vóru deyð

Herborg er ógvuliga rørd, og tárini koma ofta fram, meðan vit práta.

- Eg gjørdist ov gomul, áðrenn eg kom aftur til Føroya, og eg hevði ikki væntað at sæð so nógv fólk, sum eg kenni, sigur hon.

Hon hevði roknað við, at flestu av hennara kenningum vóru deyð, men so var ikki. Og tá Herborg fekk so nógvar innbjóðingar, at tíðin ikki strekti til, varð tað næstan ov nógv fyri hana.

Hon er ógvuliga takksom fyri tíðina, tá tey búðu í Føroyum. Og ferðin til Føroya, hevur vakt nógvar kenslur í Herborg.

- Føroyar eru mítt annað móðurland, sigur hon.

Hon sigur, at hvørja ferð, hon fær ferilin av, at føroyingar eru í Ålesund, bjóðar hon teimum inn, sama hvaðani í Føroyum tey eru.

### Konfirmatiónin bíðaði

- Tá vit komu til Føroya, var eg komin til konfirmatiónsaldur. Men vit væntaðu hvønn dag, at kríggjið fór at enda, og konfirmatiónin varð útsett.

Men tað skuldu ganga meiri enn 5 ár, áðrenn Herborg og familja hennara aftur sóu heimland sítt. Heimafturkomin vórðu øll trý systkini, Herborg, Annfrid og Helge, fermd saman.

- Eg var tann einasta, sum græt, tá vit løgdu aftur frá landi í Føroyum, sigur Herborg.

Og tað var heldur ikki undarligt, at hon græt, tí higar kom hon, júst á gáttini millum barndóm og vaksnamannalívið. Her upplivdi hon síni føgru ungdómsár - og nú mátti hon avstaðaftur.

At nærum seksti ár skuldu ganga, áðrenn Herborg sá Føroyar aftur, hevði hon helst ikki ætlað, men soleiðis bleiv tað.


## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt hjálptu og vístu samkenslu, tá okkara góða, elskaða kona, mamma, omma, dóttir, vermamma, systir og svigarinna

**Astrid Maria Dalsgård Hellisdal**

so brádliga bleiv kallað heim til Harran.

Takk til tykkum, sum hjálptu til við ervið.
Takk fyri gávur til Neyðhjálp Kirkjunnar (Folkekirkens Nødhjælp). Takk fyri blómur og kransar.
Tøkk til kirkjutænarar. Takk til Hera Joensen, prest, fyri góð og troystarrík orð.
Takk til tann stóra skara, sum fylgdi henni til hennara seinasta hvíldarstað her á fold.

*Fyri tey avvarðandi*
**Tom, Fróði og Brynhild**



NORÐOYA SPARIKASSI

Olympiskur vinnari
vitjar Norðoya Sparikassa



Undir heitinum "Viljen til sejr" verður skipað fyri fyrilestri við Arna Nielsson

Fyrilesturin verður fyri handils- og vinnulívsfólki hóskvøldið 19. juni kl. 19.00 á Klaksvíkar Tekniska Skúla

Áhugað kunnu tekna seg í Norðoya Sparikassa til og við týsdagin 17. juni

Avmarkað atgongd

Norðoya Sparikassi Ósdvegur 1 Postboks 149 FO-700 Klaksvík Tel: 475000 Fax: 476000

ns@ns.fo www.ns.fo




Samfelagsmøti:

# Færri fólk – men væleydnað

**Um hvítusunnuna vóru árligu samfelagsmøtini hjá brøðrasamkomuni hildin í Klaksvík. Umleið 1.500 fólk vóru til staðar í KÍ høllini, tá tað var upp á tað mesta**

SAMFELAGSMØTI
*Solby A. Eliasen*



*Árligu samfelagsmøtini hjá brøðrasamkomuni vóru í Klaksvík um hvítusunnuna. Eini 1.500 fólk mundu vera stødd í KÍ høllini, tá tað var upp á tað mesta*
*Mynd: Steinvør Fonn*

**Klaksvík:**
Samfelagsmøtini verða hildin annaðhvørt ár í Klaksvík og í Suðuroy. Í ár var tað so aftur brøðrasamkoman í Klaksvík, sum var vertur. Stevnan eydnaðist væl, og nógv fólk nýttu høvi til at koma til Klaksvíkar at halda hvítusunnuna og koma saman um Guds orð í KÍ høllini. John Færø er ein av fyriskiparunum. Hann heldur tó, at tað vóru heldur færri uttanbýggja fólk í ár enn undanfarin ár.

– Verkfallið var jú av fríggjamorgunin, og tá høvdu mong longu tikið avgerð um at setast aftur, so tað blivu heldur færri av bygd, men væl hilnaðist kortini, sigur hann.

Samfelagsmøtini byrjaðu hóskvøldið við møti í Betesda. Síðani varð farið í KÍ høllina hinar fýra dagarnar.

Sum nakað nýtt høvdu tey í ár eina sangløtu seinnapartin 2. hvítusunnudag. Hetta er ikki roynt áður, men John heldur, at tað eydnaðist avbera væl.

– Høllin var fullsett, og nógvur felagssangur var á skránni, sigur hann. Haraftaurat framførdi ein kvartett úr Betesda eisini.

Um kvøldarnar var opið hús. Hóskvøldið og fríggjakvøldið í Bestesda og hini bæði kvøldini í KÍ høllini. Hetta er nakað, sum hevur vundið meira og meira upp á seg seinastu árini, og nú kann tað sigast at verða vorðið ein fastur partur av samfelagsmøtunum. Og tað heldur John Færø er sera positivt.

- Tað er gott, at tey ungu kunnu savnast til eina meira avslappaða og hugnaliga løtu, har tey kunnu fáa te ella kaffi og okkurt afturvið. Tey eru savnað til einaferð út á náttina, meðan vit meiri tilkomnu fara heim at fáa okkum kaffi frá vinfólkum, greiðir hann skemtandi frá. Tey ungu plaga so somuleiðis at hava meiri tónleik, og tey hugna sær saman.

Somuleiðis vóru fleiri kór við á møtunum í ár. Talan var um fýra kór: Betesdakórið, Ebenezerkórið, Siloakórið og ungdómskórið í Betesda. Hesi sungu øll á onkrum av møtunum.

Samanumtikið so eydnaðust samfelagsmøtini bara heilt væl, hóast verkfallið á privata arbeiðsmarknaðinum vardi so longi.

John Færø er tó vísur í, at tað høvdu komið fleiri av bygd, um tað endaði fyrr.

– Tað gerst ikki við, tað verður betur næsta ár, sigur hann.

Samfelagsmøtini verða aftur næsta ár í Suðuroy á hvítusunnu.



*Sum nakað nýtt var skipað fyri eini sangløtu seinnapartin 2. hvítusunnudag. Har var nógvur felagssangur og somuleiðis framførdi ein kvartett*
*Mynd: Steinvør Fonn*

# Olympiskur vinnari vitjar Norðoya Sparikassa

**Í døgunum 18. til 21. juni kemur danski olympiski vinnarin í rógving, Arne Nielsson, til Klaksvíkar á vitjan. Á ferð síni fer hann at halda fyrilestur undir heitinum Viljen til sejr**

FYRILESTUR
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:**
Arne Nielsson kemur hendanvegin á vitjan hjá Norðoya Sparikassa. Eitt av starvsfólkunum í peningastovninum og stjórin sjálvur, Eyðfinn Reyðberg, hava hoyrt Arne Nielsson og vórðu so hugtikin av honum, at tey fóru í gongd við at fáa hann at koma hendanvegin.

Gunnar Nolsøe, marknaðarleiðari í sparikassanum sigur, at ætlanin er at hann skal halda tríggjar fyrilestrar, meðan hann er her. Ein verður mikukvøldið fyri ítróttinum. Har hava tey so boðið umboðum fyri feløg inn, umframt at tey smærri feløgini somuleiðis fáa høvi til at hoyra hansara fyrilestur.

Hóskvøldið verður so boðið alment til fyrilestur, har tað kanska serliga verður handils- og vinnulívið, sum kemur.

Fríggjakvøldið fer Arne Nielsson so at halda fyrilestur fyri starvsfólki og nevnd í Norðoya Sparikassa.

Somuleiðis er ætlanin, at hann skal vitja Klaksvíkar Róðrarfelag antin hósdagin ella fríggjadagin og halda fyrilestur fyri rógvarunum.

– Vit hildu, at tað er so líka til, at hann heldur fyrilestur fyri rógvarunum eisini, tí hann er jú olympiskur vinnari í rógving, greiðir Gunnar frá. Hann væntar ikki, at hetta, sum sparikassin er farin í holt við, verður nakað eindømi.

– Okkara áhugi í hesum er jú, at vit fáa nakað sjálvi burturúr, samstundis sum at vinnulív, ítrótturin og onnur eisini fáa nakað, sigur Gunnar.

Arne Nielsson telist millum fremstu fyrilestrarhaldararnar í Danmark og er annars seniorpartnari í fyritøkuni, Cultivator Couching, hvørs endamál er at menna organisatión, leiðslu, innanhýsis góðsku og samstarv.

Sum rógvari hevur hann rokkið betur úrslit enn tey flestu. í 1992 vann hann eitt gull og eitt silvurheiðursmerki á olympisku leikunum í Barcelona, eins og hann somuleiðis hevur luttikið í heimsmeistarakappingum í rógving við góðum úrslitum.

Fyrilesturin hjá Arne Nielsson eitur sum sagt Viljen til sejr, og her kemur hann serliga inn á, hvussu ein setur sær mál og røkkur teimum.



*Olympiski vinnarin, Arne Nielsson kemur til Klaksvíkar í døgunum 18. til 21. juni at halda fyrilestrar um at seta sær mál og røkka teimum. Tað er Norðoya Sparikassi, sum hevur heitt á Arne Nielsson um at koma til Føroyar*